gult22 cyan22 magenta22 svart22



# Havnarmaðurin í Vestmanna

**Hjørleif Kúrberg heldur eina av høvuðsorsøkunum til FM-heitið vera mátin, sum kvinnurnar hava riggað saman uttan fyri vøllin**

FØROYAMEISTARI
*Jákup Mørk*

Hóast hann av teimum flestu verður mettur sum ektaður havnarmaður, so hevur Hjørleif Kúrberg í verið annar av venjarunum hjá VÍF-kvinnunum, sum í ár hava beint alla mótstøðu til viks. Sjálvur heldur hann tó ikki, at tað er nakað løgið í hesum.

- Tað er nú ikki fyrstu ferð at eg eri her norðuri. Eg havi áður vant menninar hjá VÍF, og fyrra árið var eg somuleiðis venjari hjá kvinnunum. Nú helt eg sum so, at eg var givin, men tá tey so aftur heittu á meg, játtaði eg kortini. Tað er eisini eitt sindur ringt at siga nei, tá dótturin spælir við, sigur Hjørleif.

Ikki kann sigast annað enn, at árið hevur hylnast væl, og Hjørleif viðgongur eisini, at hann ikki eitt sekund hevur angra avgerðina.

- Nei, og so avgjørt ikki eina løtu sum hesa. Tá er alt ljósareytt, men tað fer tó avstað við nógvari tíð, sigur Hjørleif, sum annars leggur dent á, at genturnar hava verið ótrúliga góðar at fáast við. Ikki minst leggur hann dent á, hvussu væl tær hava riggað saman sosialt.

### Ikki bangin

Mong mundu halda, at FM-vónirnar fingu eitt álvarsligt skot fyri bógvin, tá Nicoleta Radu breyt beinið, men hóast hetta var ein stórur missur, so sigur Hjørleif, at hann ongan tíð var bangin um, at tað kanska fór at kiksa.

- Tað haldi eg ikki, at mann kann siga. Vit hava havt eitt sera væl virkandi lið, har tær ungu hjá okkum veruliga hava ment seg í ár, soleiðis at talan í veruleikanum er um eitt lið uttan tær heilt stóru stjørnurnar. Gaman í skjýtur Ioana nógv mál, men hon tekur so eisini stóran part av brotskøstunum.

Har umframt má eg so eisini rósa Daniel fyri tað arbeiði, sum hann hevur framt í árinum. Eg kann bara siga tað allarbesta um evni hansara sum venjara, og hetta hevur so avgjørt verið ein av høvuðsorsøkunum til góða úrslitið, sigur Hjørleif Kúrberg at enda.



*Hóast Nicoleta breyt beinið, so var Hjørleif ongan tíð bangin um, at FM heitið fór at kiksa hjá teimum*
*Mynd: Álvur Haraldsen*

# Drúgvur á vøllinum

**The Grand-old man hjá vestmenningum er uttan iva Sjúrður Holm, sum í samfull 22 ár hevur spælt hondbólt í bestu mansdeildini**

FØROYAMEISTARI
*Jákup Mørk*

Ein av høvuðsstuðlunum hjá VÍF í mong ár hevur verið drúgvi verjuleikarin, Sjúrður Holm. Hóast hann ikki er so nógv at síggja á máltalvuni, so liggur hansara partur í fullmerkjunum so avgjørt ikki eftir.

### Brellast altíð

Tað hevur annars fleiri ferðir ljóðað, at Sjúrður skuldi gevast við hondbóltinum, og onkun tíð hevur hann eisini sagt farvæl. Spurdur, hvussu tað ber til, at hann kortini er aftur at síggja, sigur hann, at tað fyrst og fremst er hugurin, sum drívur verkið.

- Tað er stuttligt. Hvørja ferð mann hevur hug at gevast, brellist eg kortini aftur, og so er bara at fara ígongd.

Tey bæði seinastu árini hevur hetta tó ongan tíð verið upp á tal. Sjúrður hevur tá verið við frá fyrsta venjingarkvøldinum, men soleiðis hevur ikki verið altíð.

- Nei, okkurt árið havi eg ikki havt stundir vegna arbeiðið, men tá teir so hava heitt á meg, so eri eg altíð farin ígongd kortini, sigur verjuskansin, sum í ár leikti sítt 22. ár í bestu mansdeildini. Hann kom blaðungir inn á besta mansliðið hjá Neistanum í 1979, og hevur hann síðani hetta spælt í bestu deildini.

Spurdur, um hann eisini verður at síggja á liðnum hjá VÍF sigur Sjúrður, at tað veit hann ikki.

- Nú tori eg so ikki at siga nakað sum helst, eru seinastu orðini frá Sjurða Holm.

*Sjúrður torir ikki at siga nakað um, hvørt hann verður aftur á vøllinum komandi kappingarár*
*Mynd: Álvur Haraldsen*



# VÍF fær meðan hini missa

**Ingi Olsen heldur, at meðan hini liðini antin eru viknaði ella standa í stað, so hevur VÍF í ár styrkt um hópin, og at hetta er orsøkin til einaveldi teirra í landskappingini**

FØROYAMEISTARI
*Jákup Mørk*

Meðan vit í fjør og fyrra árið høvdu tvær øgiliga spennandi landskappingar í bestu mansdeildini, hevur kappingin í ár verið fullkomuliga dominerað av VÍF. Tað er annars bert eitt ár síðani, at VÍF stóð sum tapari í einum alt avgerandi dysti, har einki varð avgjørt fyrr enn seinasta korterið, men soleiðis var ikki í ár.

### Eru styrktir

Ein av VÍF leikarunum tá sum nú, er Ingi Olsen. Eftir at teir høvdu smurt strandingarnar av leygardagin, hittu vit hann, og spurdu, hvat tað er, sum er hent við kappingini í ár. Eru tað hini liðini, sum eru vorðin veikari, ella er VÍF bara so nógv betri fyri í ár.

- Um tú hyggur eftir hinum liðnum sum heild, so er greitt, at vit hava fingið styrk. Eitt nú var Áki ikki í okkara parti í fjør, og hann gjørdi millum annað um seg seinasta dystin í Vestmanna. Í ár hevur hann so verið við okkum, og tað er so sjálvandi ein styrkur, samstundis sum hetta hevur verið ein missur fyri Neistan.

- Eisini hava vit fingið John aftur í ár, eins og vit hava havt útlendskan leikara, so alt í alt haldi eg, at vit eru sterkari í ár, enn vit vóru í fjør. Ikki minst hevur breiði hópurin gjørt sítt.

Spurdur um teir í ár hava vant harðari enn vanligt, sigur Ingi, at tað heldur hann ikki.

- Vit hava vant tær tríggjar-fýra ferðirnar um vikuna, sum vit plaga, so í so máta er einki broytt. Vit vóru tó á eini venjingarlegu undan kappingini, og hetta hevur kanska merkt, at vit alt fyri eitt vóru væl fyri.

- Vit hava eisini verið nóg hepnir til at vinna fleiri dystir við einum máli, og tað sigur kanska eisini nakað um, at vit hava verið tað betri fyri enn mótstøðuliðini. Eg trúgvi í øllum førum ikki, at tú bara ert heppin tíggju ferðir á rað, sigur hann smílandi.

- Har afturat er tað eisini umráðandi, at leikararnir duga at vinna og tora at vinna. Har haldi eg okkum hava verið dugnaligar til at halda høvdið kalt í avgerandi løtum, og í fleiri dystum hevur tað nærum verið soleiðis, at vit snøgt sagt ikki hava trúð upp á møguleikan fyri einum tapi. Hinvegin sóu vit eitt nú í steypafinaluni, at tá tað so brádliga gongur okkum illa, so fáa vit einki til at rigga.



*Ingi Olsen sigur seg ikki halda upp á pátrúgv, men kortini spælir hann at kalla altíð í somu orangulittur T-troyggjuni undir VÍF-búnanum*
*Mynd: Álvur Haraldsen*

### Vildu hevna seg

Nú nevndi Ingi sjálvur steypafinaluna, og einki er at ivast í, at hetta var dyggur smeitur hjá vestmenningunum. Harafturat vóru teir fyri einasta stigamissi í landskappingini móti júst StÍF, og Ingi ásannar eisini, at teir ætlaðu sær at hevna hetta, tá teir fóru á vøllin leygardagin.

- Eg haldi, at tað var sjónligt í dag, at vit vóru meira uppsettir í dag enn teir. Ein trupulleiki hjá okkum hevur eisini verið, at vit hava svingað nógv upp og niður sálarliga. Móti Kyndli herfyri vóru vit til dømis sera tamir, men eg haldi at vit í dag prógvaðu, at vit eru førir at spæla væl betri enn nakað annað lið í Føroyum.

### Orange-litta troyggjan

Tey, sum hava fylgt VÍF seinnu árini, hava kanska lagt til merkis, at Ingi at kalla altíð spælir í einari orangelittari troyggju innan fyri gula VÍF búnan. Spurdur um hetta hevur nakað við pátrúgv at gera, svarar Ingi, at tað heldur hann ikki.

- Nei, eg haldi ikki, at talan er um pátrúgv. Eg hevði hesa troyggjuna heimvið, eftir at eg hevði verið niðri og spælt. Har høvdu vit altíð hesar troyggjurnar innan fyri, og tað er so nakað, sum eg havi fast við. Kanska tí vit fluttu upp tað árið, sum eg spældi í Danmark.

- Eg havi tó ikki verið í henni hvørja ferð, men seinastu dystirnar havi eg so altíð verið í henni. Eg minnist ikki, um eg kanska havi gloymt hana, onkra ferðina, tá vit hava tapt. Í steypafinaluni var í øllum førum sera heitt í høllini, so kanska havi eg ikki verið í henni tá. Tað skuldi eg kanska havt gjørt, sigur Ingi Olsen at enda.

gult23 cyan23 magenta23 svart23



# Finaluluttakararnir funnir

**Hálvfinalurnar í FM-kappingini fyri pør vórðu avgreiddar um vikuskiftið, og nú er greitt, hvørji tey 26 í finaluumfarinum verða**

BRIDGE
*Arnbjørn Sivertsen og Bogi Simonsen*

Luttøkan til semifinaluna í FM kappingini fyri pør var ikki av teimum størstu í ár. 22 pør spældu við, og er hetta nakað væl minni, enn tað plagar at vera. Vert er at leggja til merkis, at eingin luttøka var av bygd, tá Eysturoyggin er undantikin. Hetta er stórt spell.

FBS hevði biðið føroyameistararnar frá í fjør, Róa á Rógvu Joensen og Heðin Mouritsen, skipa fyri og vera kappingarleiðarar í semifinaluni. Hetta greiddu teir avbera væl og fingu nógv uppiborið rós frá luttakarunum í kappingini fyri avrik á høgum støði.

Eitt par skaraði framúr í semifinaluni. Símin Lassaberg og Árant Berjastein, sum hava verið makkarar í fleiri ár men ikki hava spælt saman í ár, høvdu funnið saman aftur til hesa kappingina, og teir vunnu við ikki minni enn 69 stigum til nr 2. At hetta er annað av pørunum, sum skal umboða Føroyar í norðurlendsku kappingini í Rottneros í mai, kunnu vit fegnast um og kanska vanta okkum eitt gott úrslit har í ár (hitt parið er Árni Dam og Marner Joensen).

Men fyrst skal so FM finalan fyri pør avgreiðast, og eru Símin og Árant avgjørt millum favorittarnar.

Tey 13 pørini, sum spældu seg í finaluna, vóru hesi (miðal er 0):

| | |
|---|---|
| 1. Símin Lassaberg – Árant Berjastein | 150 |
| 2. Mortan Rasmussen – Finn Ougaard | 81 |
| 3. Marner Joensen – Árni Dam | 65 |
| 4. Magni Jøkladal – Pól Egholm | 63 |
| 5. Oddmar Danielsen – Einar Ellingsgaard | 52 |
| 6. Zakaris Joensen – Salomon Johansen | 33 |
| 7. Atli Hansen – Jógvan Ranghamar | 29 |
| 8. Bogi Simonsen – Niels Nielsen | 22 |
| 9. Eybjartur Danielsen – Hallberg Arnfríðsson | 22 |
| 10. Reimund Langgaard – Bjarki Johannesen | 18 |
| 11. Øssur Winthereig – Luitjen Apol | 14 |
| 12. Hans Egil Joensen – Edmund Joensen | 2 |
| 13. Ingibjørg Hansen – Henriette Svenstrup | -14 |

FM finalan fyri pør verður leikt í Bridgehúsinum í Havn leygardagin 21. apríl.

Í finaluni vera 16 pør. Trý pør fingu fríplass í finaluna, m.a. orsakað av, at tey hjálptu til við at skipa fyri semifinaluni. Hesi eru eru:
Rói á Rógvu Joensen – Allan Dal-Christiansen
Heðin Mouritsen – Jóannes Mouritsen
Hans Jacob Petersen – Arnbjørn Sivertsen

### Spælið

Vit hava einki spæl frá semifinaluni at seta í blaðið. Men her er eitt spæl frá liðkappingini í Havnar Bridgefelag, sum vit fingu frá Símin Lassaberg.

N/-

**Norður**
KQ102
A65
87532
3

| **Vestur** | **Eystur** |
|---|---|
| 54 | J983 |
| KQJ843 | 107 |
| KQ | J6 |
| J5 | K9762 |

**Suður**
A76
2
A1094
AQ1084

NS: Símin Lassaberg – Árni Dam
EV: Oddmar Danielsen – Hannis Jacobsen

| **Vestur** | **Norður** | **Eystur** | **Suður** |
|---|---|---|---|
| - | pass | pass | 1 kl |
| 1 hj | D* | pass | 2 rú |
| 2 hj | 3 rú | pass | 5 rú |
| pass | pass | pass | |

* Negativ dupling. Lovar teir ómeldaðu litirnar.

Útspælið var hj K, sum Árni tók við essinum. Hann spældi síðan rútara til níggjuni, og frúgvin fekk stikkið. Hannis spældi hjQ aftur, sum Árni trumfaði. Hann tók klA, spældi kleyvara til trumf, rútara til essið, kleyvara til trumf, tók spK, spældi spaðara til essið, enn ein kleyvara til trumf, og støðan var hendan.

Q10
6
-
-
J9
ongan -
týdning -
K
7
-
10
Q

Tá Árni nú spældi hjartara frá borðinum til trumf á hondini, skuldi Eystur halda sp J9 og kl K, sum jú var ómøguligt. Hann var skvisaður. Væl spælt av Árna, hóast hetta bara var eitt týdningarleyst yvirstikk í einum liðdysti.



# Atli Gregersen á besta liðnum í Randers

**Fekk rós frá venjaranum, tá hann leygardagin í Brønshøj fyri fyrstu ferð royndi seg í næstbestu deildini**

ÚTISETAR
*Jóannes Hansen*

Ein føroyingur afturat tykist ætla at gera um seg í donskum fótbólti. Talan er um átjan ára gamla Atla Gregersen. Hann hevur tey bæði seinastu árini vant í Randers, og leygardagin fekk hann fyri fyrstu ferð møguleikan á besta liðnum hjá Randers Freja.

Randers liðið, sum er í næstbestu deildini, vitjaði í Brønshøj í Keypmannahavn, og Atli Gregersen kom á vøllin, tá seinna umfarið var gott og væl hálvrunnið. Tá var støðan 1-0 til heimaliðið, sum endaði omaná við 3-0 sigri. Brønshøj telist millum liðini í næstbestu deildini, sum úrslitaliga hevur havt mesta undanvindin nógvu tey seinastu umførini.

Atli Gregersen er verjuspælari. Ta løtuna hann var á vøllinum fóru tvey mál ígjøgnum, og tí kann tað kanska tykjast, sum um hann ikki var við til at gera støðuna betur, eftir at hann var komin á vøllin.

Men tað helt lokala blaðið í Randers ikki í sunnudagsútgávuni:

– Ungi føroyingurin var ein av teimum heilt fáu, sum kundi vera nøgdur við hugburðin og avrikið, staðfesti tíðindamaðurin, sum hevði verið við sínum býarliði í Keypmannahavn.

Seinnapartin av seinna umfarinum hevði Randers Freja nógv fólk frammi á vøllinum, tá teir royndu at javna. Stutt eftir at Atli Gregersen var komin á vøllin, hevði hann eftir hornaspark góða skotroynd, sum fór dygst skeivu megin stólpan.

### Vilja frameftir

Atli Gregersen traðkaði fyrstu fótbóltsskógvarnar í B36. Fyri nøkrum árum síðani flutti hann saman við foreldrunum niður á Bornholm. Nú gongur hann annað árið á handils studentaskúla í Grenå, har serligur dentur verður lagdur á ítrótt og hjá Atla fótbólt. Ábyrgdina fyri fótbóltsvenjingini á skúlanum hevur Kent Nielsen, sum er uppvaksin í Brønshøj, og sum fyri tíggju árum síðani var ein av stuðlunum í miðverjuni á landsliðnum.

Teinurin úr Grenå og til Randers er 55 kilometrar, og hjá Atla Gregersen fer tað dagliga við rúmari tíð at koyra aftur og fram í bussi. Men hugurin til fótbóltin hjá 194 centimetra høga unga manninum er góður, og leygardagin fekk hann fyrstu rættuligu ábendingina um, at tað fer kanska at spyrjast nakað burturúr.

Atli Gregersen vil fegin gera nógv við fótbóltin. Tað vilja teir í Randers eisini. Krúnjydarnir, sum teir vanliga verða róptir, eru eitt sindur niðanfyri miðjuna í næstbestu deildini. Málið er at røkka bestu deildini. Tað gera teir neyvan í hesum kappingarárinum. Men tað er ikki ónhugsandi, at tað verður grundarlag fyri uppflyting seinni. Áhugin fyri fótbólti í Randers er stórur. Tað sást á áskoðaratalinum hjá Randers Freja á heimavølli. Har møta fleiri upp, enn tað gera í flestu øðrum feløgunum í 1. deild.

Vánirnar fyri framgongd og harvið uppflyting eru altíð tengdar at fíggjarliga grundarlagnum. Tølini á niðastu regluni eru sum oftast reyð hjá fótbóltsfeløgunum í Danmark. Í Randers Freja kenna teir nógv til hetta. Fyri nøkrum árum síðani fór peningafótbólturin í býnum á húsagang. Nú hevur Randers Freja strítt seg aftur í næstbestu deildina.

Men teir hava ikki spent fíggjarliga bogan serliga høgt. Fyri stuttum varð roknskapurin fyri síðsta fíggjarár almannakunngjørdur. Tað varð nógv umrøtt í donskum fjølmiðlum, at felagið hevði eitt rættuliga fitt avlop. Hetta átti at givið felagnum og harvið eisini føroyska miðverjanum, Atla Gregersen, møguleikar fyri menning og framgongd.